**Bárður Larsen, ritstjóri**

# Lógarritið sum kjaktorg

Við hesi seinastu útgávuni frá farna ári er Føroyskt Lógarrit komið út í fýra ár. Seinastu útgávurnar hava verið seinkaðar nakað, men slíkum er ringt at sleppa undan, tá tað snýr seg um ólønt og sjálvboðið arbeiði, ið legst aftrat dagliga yrkinum; tó so fara vit at royna at taka okkum um reiggj, at tað ikki gerst vani, at útgávurnar eru seinkaðar.

Eitt endamál við lógarritinum var upprunaliga at skapa eitt forum, har fakliga áhugaðir føroyingar kundu kjakast um lógar- og stjórnarspurningar, ið serliga viðvíktu Føroyum. Nú fýra árgangir eru farnir aftur um bak, og tað fer at tátta í fimm ár síðan, at stig varð tikið til at seta ritið á stovn, kann vera hóskandi at seta spurningin, um eitt av nevndu endamálum er rokkið, og lógarritið er vorðið eitt torg, hagar føroyingar leita sær, tá teir hava okkurt upp á hjartað í spurningum um stjórn og lóg. Verður hugsað um, at tað enn ikki er hent, at høvundur í seinni útgávu av ritinum hevur fingið svar ella viðmerking, so kann ikki sigast, at ritið er blivið tað kjaktorg sum upprunaliga ætlað.

Ein orsøk til at ritið ikki er vorðið stað, har tey lógkønu kjakast, kann vera, at árligu útgávurnar einans eru tríggjar í tali og tí ov fáar í til at fáa kjak í gongd. Onnur orsøk kann vera, at tær longu greinarnar virka styggjandi fyri høvundar, ið heldur eru til styttri greinar uttan so nógvar ávísingar. Ritstjórnin hevur leingi roynt at birta upp undir at fáa haldarar og onnur at lata ritinum styttri greinar, sokallaðar greinastubbar. Greinin hjá Jens Wang í hesi útgávuni um fjarskifti í Føroyum og ES er frálíkt dømi um, hvussu hetta kann verða gjørt, og vilja vit heita á onnur áhugað um at bjóða seg fram.

Tá lógarritið ikki í sjálvum sær tykist at vera nóg væl egnaður miðil til at birta upp undir kjak millum føroysk lógar- og stjórnarkøn, fer ritstjórnin at taka onnur stig til tess at royna at fáa kjak, ið tað skrivaða orðið ikki megnar einsamalt.

Fyrr hevur lógarritið skipað fyri væleydnaðum fakligum kjakkvøldi; men í framtíðini ætlar ritstjórnin at gera alment kjak til fastan tátt hvørja ferð, at lógarritið er komið út. Ætlanin er at boða til fundar, har høvundarnir helst luttaka, har

greinaevni, ið egna seg til kjak, verða á skránni. Íkastini til hetta ritið frá Trinemiu Johannesen og Kristinu Samuelsen, um ávikavist almennar grunnar og leiklutin hjá skrivstovufólki á tingi, eru dømi um vælegnað kjakevni. Vónandi fara fólk síðani heim aftur undir væðingina við íblástri at skriva svar síni til næsta rit.

Seinasta útgáva í fjórða árgangi verður eisini merkt av, at ritið nú fyrstu ferð verður prentað við nýggjari uppseting og egnum búmerki, ið Eyðun Eliasen arkitektur hevur evnað til.